# út at koyra

## Astra met sølu í Europa

Opel/Vauxhall Astra vóru væl umtóktir bilar í Europa í 1999, har teir høvdu eina metstóra sølu uppá 745.000 bilar á vestur- og miðeuropeiska marknaðinum, har sølan vaks við 18,2% síðan 1998.

Eisin vóru Opel/Vauxhall Astra Wagon mest seldi stationvognur í Europa í 1999.

63 føroyingar keyptu sær ein Astra í 1999.

## Pick-upar væl umtóktir í USA

Pick-upar ella smærri lastbilar eru betur umtóktir enn persónbilar í USA.

Í 1999 vóru 53% av øllum nýggjum bilum smáir lastbilar, men tað er sera sjáldan at nakað er í lastini.

**FDM/Motor**

## Eisini Jeepar

Tað verða eisini seldir nógvir bilar við trekk á øllum fýra hjólunum, Jeepar og Pick-upar í USA. Ein nýggj kanning vísir, at umleið 10% av øllum fýrahjólstrekkjarum í USA koma út fyri at koyra á vegi, sum ikki er asfalteraður.

**FDM/Motor**



## Renault Avantime

Renault kemur ætlandi við einum stórum nýggjum bili í ár. Hesin Avantime líkist einari blanding av coupé og stationvogni. Fyrsta útgávan verður við einum 3.0 motori við 210 hk, seinni kemur ein 2.0 motorur við 140 hk.

**FDM/Motor**

# Opel bilar við svenskari trygd

*SAAB bilverksmiðjan í Svøríki hevur ment eina sera framkomna nakkapútu, sum við at trýsta seg upp og fram bjargar nógvum skaðum á rygg og háls - serliga tá talan er um harmonikusamanstoytir. Pútan verður nú standardútgerð í fleiri Opelbilum*

MAGNUS GUNNARSSON

Saab bilverksmiðjan í Svøríki uppfann »aktivu nakkapútana«, sum er í Saab bilunum, og nú verður standardútgerð flestu Opel bilunum.

Hetta er ein nakkapúta, sum í einum samanstoyti flytur seg upp og framyvir móti høvdinum hjá teimum, sum sita í bilinum.

### General Motors keypt Saab

General Motors í USA hevur júst nú boðað frá, at teir hava keypt seinasta helmingin av partabrøvunum í Saab Automobile, og at tann »aktiva nakkapútan« verður standardútgerð á teimum nýggju Opel bilunum av slagnum: Astra, Vectra, Omega, Zafira og Flexivan, eins og á øllum Saab bilunum.

Endamálið við hesi nakkapútu er at minka um vandan fyri skaða, tá bilurin verður ákoyrdur aftanífrá.

Teir alsamt vaksandi skaðar á háls og rygggeislar koma av tí økta talinum av samanstoytum aftanífrá, sum er ein beinleiðis avleiðing av tættleikanum í ferðsluni í Europa.

Tey seinastu 30 árini er talið av skaðum á háls- og rygggeislar tvífaldað. Hesar »aktivu nakkapútur« eru eitt stórt stig tann rætta vegin. Skaðar á hálsin, nakkan og rygggeislar enda ofta við álvarsamari pínu hjá sjúklinginum, og krevur dýrar og langar viðgerðir.

### Beinanvegin klár til næsta stoytin

Nakkapútan er mekanisk og er beinanvegin klár til næsta stoytin, við til dømis ein harmonikusamanstoyt, tá lyftur pútan seg 2 cm. uppeftir og góðar 6 cm inn ímóti høvdinum. Nú eru tað ikki øll, sum koyra í einum nýggjum Saab ella Opel, men á flestu bilum kunnu nakkapúturnar stillast. Tá er rætt at stilla púturnar á hædd við høvdið, og um tær kunnu stillast framyvir, so eisini fram ímóti nakkanum.

Eitt gott og stuðlandi bilsetur við nógvum møguleikum at stilla inn, er ein týdningarmikil partur av trygdarútgerðini í einum bili.

**Kelda: Berlingske Tidende**



*Av tí at nakkapútan er bygd á einfaldan mekanik, er hon beinanvegin klár til næsta stoytin. Tað kann koma væl við í einum harmonikusamanstoyti, har ein ákoyring kann blíva til fleiri*




*Aktiva nakkapútan hjá SAAB...*




*...verður nú standar í fleiri Opelbilum*



# út at koyra




*Nú er fronturin á nýggjastu Corolla bilunum broyttur, so at hann líkist meira Avensis*

**Myndir: Álvur Haraldsen**

# Broyttur Toyota Corolla við nýggjum motori

MAGNUS GUNNARSSON

Leygardagin 5. februar var framsýning av nýggjasta Toyota Corolla í bilhøllini hjá Reyni Service í Hoyvík, har Fragd & Fimi eisini skipaði fyri eini kapping fyri sterkar menn.

Síðani seinasti Corolla kom á marknaðin, hevur tað verið ógvuliga ymiskt, hvat fólk hava hildið um útsjóndina á bilinum framman. Nú er fronturin á nýggjastu Corolla bilunum broyttur, so at hann líkist meira Avensis at síggja til, og verður ein bilur, sum flest øllum fer at dáma.




*Teldan í bilinum vísir m. a. miðalbensinnýtslu, miðalferð o. a.*

### Multi Informatiónssystem

Innan eru eisini broytingar gjørdar. Setrini eru betri at sita í og stuðla væl, og alt er sum vanligt lætt at handfara. Trygdin í nýggja Corolla bilinum er á høgum støði. Bilurin hevur dupultairbag, síðuairbag, ABS-bremsur við EBD (Elektronic Brake force Distribution), sum er ein elektronisk stýring av bremsukraftini millum hjólini. Eisini hevur bilurin eitt »multi-informatiónssystem« við upplýsingum um miðalbensinnýtslu, miðalferð og stýring av radio o.a.

### Nýggjur VVT-i motorur

Motorarnir eru heilt nýggir við variablum ventilstýringum, sum Toyota kallar VVT-i teknologi. Úrslitið er ein motorur við meira kraft, brúkar minni og dálkar minni.

Motorurstøddin er eisin broytt, við tað at tann minsti nú er 1.4 ccm. við 16 ventilum og 97 hk., fyrr var 1.3 motorurin tann minsti. 1.6 motorurin við 16 ventilum hevur 110 hk. Seinni í ár kemur ein nýggjur dieselmotorur.

Undirvognurin er strammaður upp, og koyrieginleikarnir eru munandi betri.

### 12 ára garanti

Bilurin fæst í trimum útgávum, hvat útgerð viðvíkur: Natura, Terra og Sol. Standard útgávan er Natura, við m. a. servostýring forlyktavaskara og »multi informatiónsdisplay«.

Tann næsti er Terra við hita í síðuspeglunum, sentrallási, el-síðurútum framman.

Tann fínasti er SOL við aircondition, fjarstýrdum sentrallásum, el-síðurútum framman og aftan, veloursetrum og tokulyktum framman.

Corolla er ein dygdargóður bilur við trý ára garanti uppá teir mekanisku lutirnar, 3 ára lakkgaranti og 12 ára garanti móti gjøgnumtering av skrokkinum.

Altíð hevur Corolla verið væl móttikin, og Toyota hevur síðan 1966 framleitt yvir 23 milliónir Corolla bilar.









**TOYOTA**

## Corolla

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Motorar:** | 1.4 ccm | 4 syl | 16 V | 97 hk. |
| | 1.6 ccm | 4 syl. | 16 V | 100 hk. |
| **0-100 km/t** | | 11.8 sek. (1.4 motorur) | | |
| | | 10.0 sek. ( 1.6 motorur) | | |
| **Trekk:** | | Framman | | |
| **Dekkstødd:** | | 165/70-14 (Natura) | | |
| | | 175/65-14 (Terra & Sol) | | |
| **Bremsur:** | | Skivur framman og aftan | | |
| **Bensinnýtsla:** | | 1.4 ccm. 14.7 km/l | | |
| | | 1.6 ccm. 14.3 km/l | | |
| **Vekt og stødd:** | | | | |
| | | Hb 3/h | Lb 5/h | Sedan |
| **Eginvekt:** | 1.4 ccm | 1050 kg | 1075 kg | 1025 kg. |
| | 1.6 ccm | 1075 kg | 1100 kg | 1050 kg. |
| **Totalvekt:** | 1.4 ccm | 1575 kg. | 1575 kg. | 1575 kg |
| | 1.6 ccm. | 1625 kg | 625 kg. | 1625 kg. |
| **Viðførisrúm:** | | 281 l | 372 l | 390 l |
| **Longd:** | 412,0 cm | 429.0 cm. | | 431.5 cm. |
| **Breidd:** | 169.0 cm | 169.0 cm | | 169.0 cm. |
| **Hædd:** | 138.5 cm. | 138.5 cm. | | 138.5 cm. |

**Vekt og stødd:**

| | Hatchback 3/h | Liftback 5/h | Sedan |
|---|---|---|---|
| Eginvekt: 1.4 ccm | 1050 kg | 1075 kg | 1025 kg. |
| 1.6 ccm 1075 kg | 1100 kg | 1050 kg. | |
| Totalvekt: 1.4 ccm | 1575 kg | 1575 kg | 1575 kg |
| 1.6 ccm | 1625 kg | 1625 kg | 1625 kg. |
| Viðførisrúm: | 281 litrar | 372 litrar | 390 litrar |
| Longd: | 412,0 cm | 429.0 cm | 431.5 cm. |
| Breidd: | 169.0 cm | 169.0 cm | 169.0 cm. |
| Hædd: | 138.5 cm | 138.5 cm. | 138.5 cm. |
| Prísir: | | | |
| 1.4 ccm Natura | kr. 144.000 | kr. 154.400 | kr. 152.400 |
| 1.6 ccm Terra | kr. 156.400 | kr. 166.400 | kr. 164.400 |
| 1.6 ccm Sol | kr. 164.400 | kr. 174.400 | kr. 172.400 |

**Søluumboð:**
**P/F Reyni Service Vegurin langi**
**FO-188 Hoyvík telefon: 313040**